## Skúlastýrisfundur nr. 1

Stað: Skúlin á Argjahamri - Stórastova

Dato: 14.01.2025

Møtt á fundi:

Ása Chirstiansen, skúlastýrisforkvinna

Guðrun Kerá, foreldraumboð

Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð

Louisa Niclasen, læraraumboð

Marin S. Bláberg, skrivari

Mál á skrá:

| | |
|---|---|
| Fundardagar fyri skúlaárið 2025 | 14. Januar – vanligur skúlastýrisfundur<br><br>4. mars – vanligur skúlastýrisfundur<br><br>6. mai – vanligur skúlastýrisfundur - fundur við foreldraumboðini um telefonpolitikk komandi skúlaár.<br><br>2. September – vanligur skúlastýrisfundur<br><br>7. Oktober – fundur við næmingaráðini<br><br>4. november – fundur við foreldraumboðini |
| Skúlastjórin ynskir broyting í viðtøkunum fyri næmingaráðini á Argjahamri. Hetta hevur verið til umrøðu hjá næmingaráðunum og tey taka undir við broytingini | Skúlastýrið tekur undir við skúlanum. Tí er viðmælt at gera broytingar í viðtøkunum fyri næmingaráðini í Skúlanum á Argjahamri |

| | |
|---|---|
| | *Broyting viðvíkjandi dekorumsreglum bleiv viðtikin av báðum næmingaráðum og Skúlastýrinum í Skúlanum á Argjahamri 14.01.2025*<br><br>*Sí niðanfyri*<br><br>***Dekorumsreglur/tignarreglur***<br><br>*Limir í næmingaráðnum skulu til einhvørja tíð vísa sømiligan atburð mótvegis øðrum næmingum, lærarum og skúlanum sum heild. Teir skulu hava fyri eyga at vísa sína bestu síðu, tá tað kemur til atferð og sosialar reglur soleiðis, at teir kunnu vera ein fyrimynd fyri aðrar næmingar.*<br><br>*Fyri limir, sum ikki halda seg til dekorumsreglur er hetta galdandi:*<br><br>*Limurin fær fyrst eina munnliga ávaring frá toymisleiðaranum. Heldur limurin fram við neiligari atferð, verður onnur ávaring givin frá skúlaleiðsluni. Triðju ferð limur ikki heldur seg til dekorumsreglur, verður hann skiftur út og eykalimur verður tikin inn í staðin.* |
| Fartelefonir í skúlanum | Skúlastýrið metir, at hesar broytingar skulu gerast í viðtøkunum fyri SAH.<br>- Fartelefonin skal í allar størsta mun liggja heima.<br>- Skúlastýrið ynskir, at broyta reglugerðina hjá skúlanum soleiðis, at orðið fartelefon stendur í eini yvirskrift.<br>- Tað skal eisini koma fram í tekstinum, at fartelefonin hevur neiliga ávirkan á arbeiðsminnið, |
| Samskifti | Samskifti – reglur:<br>- Vit hava virðiligt samskifti<br>- Vit vísa virðing fyri hvørjum øðrum<br>- Niðrandi samskifti og ókvæmisorð verða ikki góðtikin<br>- Samskifti fatar bæði um munnligt og skriftligt samskifti, umframt samskifti á talgildum miðlum.<br>- Virðiligt samskifti er við til at skapa gott samstarv og ein jaligan felagsskap |

| | |
|---|---|
| Annað | Flokslærarin í 9. b, Mariann Poulsen, hevur sent umbøn inn um, at 9.b kann fara námsferð til Danmarkar í mai mánaða.<br><br>Skúlastýrið hevur gjørt av at geva 9.b undantaksloyvi at fara námsferð til Danmarkar |
| Ynski um mál til fundin 4. mars | Skúlastýrið ynskir at skriva eitt bræv til kommununa um busssambandið millum skúla og AB húsið. Ynski er, at tað skal gerast lættari hjá næmingunum á Argjahamri at fara til fótbólt í nærumhvørvinum eftir skúlatíð. |

Fundartíð: 16.00-19.00

Møguligur nýggjur tekstur til: "Reglugerð fyri Skúlan á Argjahamri"

Fartelefonir:

- Fartelefonir og snild-ur skulu vera sløkt ella sett á "flight mode" og latast inn um morgunin. Tólini verða goymd í skápinum, meðan skúladagurin er. Næmingarnir fáa tey aftur, tá skúladagurin er liðugur. Telefonir og snild-ur kunnu bert nýtast sum amboð í undirvísingini, tá hetta er avtalað við læraran. Um eitt tól verður brúkt á órættan hátt, tekur lærarin tað frá næminginum og letur tað inn á skrivstovuna við navninum á. Foreldrini kunnu síðani heinta tólið á skrivstovuni áðrenn kl. 15:30 sama dag.
- Bluetooth-eindir, so sum AirPods, kunnu nýtast, um lærarin gevur loyvi.
- Kjarnuuppgávan í einum skúla er læring. Læring er ein av teimum mest krevjandi tilgongdunum í heilanum. Um heilin samstundis, sum hann skal læra, fær upplýsingar frá fartelefonini, so verður arbeiðsminni fult og næmingurin fær ikki tað burturúr undirvísingini, sum hann hevur tørv á. Skúli og skúlastýrið í Skúlanum á Argjahamri mæla tí til, at fartelefonin í størstan mun liggur heima.

Samskifti:

- Vit hava virðiligt samskifti
- Vit vísa virðing fyri hvørjum øðrum
- Niðrandi samskifti og ókvæmisorð verða ikki góðtikin

- Samskifti fata bæði um munnligt og skriftligt samskifti, umframt samskifti á talgildum miðlum.
- Virðiligt samskifti er við til at skapa gott samstarv og ein jaligan felagsskap

Skúlin á
Argjahamri